Glorybox og prát og roks

TÓNLEIKUR. Rokkbólkurin Glorybox, vi› føroyska guitarleikaranum og sangskrivaranum Jan Johansen, er farin at gera um seg í Europa. Konsertfer› teirra í Benelux hevur gingi› væl, og helst ver›a tey á palli í Føroyum í seinnu helvt av mei mána›i

Glorybox vi› føroyska guitarspælaranum Jan Johansen, uttast til høgru

Meinhard Jensen

Stutt sí›an gav bólkurin Glorybox út fyrstu fløgu sína, Vacuum. Tey vóru í Føroyum í fjør, og koma eftir ætlan skjótt aftur. Hendan greinin sn‡r seg mest um tónleikin, men eisini onnur ting. Til seinast er ein samrø›a vi› norska limin í bólkinum Jan-Erik Stig.

Yndisligt skról

Glorybox halda til í Keypmannahavn, men eru úr Noregi (Jan-Erik), Føroyum (Jan) og USA (Sarah).

Onkur hevur kalla› tónleikin Noizz Pop (larmi-poppur). Eitt serligt slag av noise-rocki, sum hoyrist aftur hjá Glorybox, er tónleikurin hjá Sonic Youth vi› teirra altkøvandi guitara vi› nógvum fussi og nógvari tyngd og eitt sindur av fesji. Ta› hoyrist, at tey hava lurta›, kanska eftir Garbage, Depeche Mode, Portishead osfr (navni› Glorybox er eftir einum sangi á fyrstu plátuni hjá Portishead). Og so einum heilt serligum slagi av alternativum kristnum rokki, sum t.d hjá Starflyer 59 og Morella's Forest, sum tó eru heilt ókend hjá okkum.

Tónleikurin skiftir nógv millum ta› vakra og ta› ógvusliga, líka sum Nirvana ofta gjørdu, men ta› vakra og popputa er meira Cardigans enn Nirvana.

T‡›andi partur av tónleikinum er at royna ymisk ljó›, og her fer ta› ofta til marki› vi› ta› ómusikalska, uttan tó at fara yvirum. Møguleikarnir í guitaranum ver›a nógv troyttir. Til dømis leg›i Jan hann frá sær eina løtu á onkrum konsertum, tey høvdu í Føroyum, og spældi upp á pedalirnar og effektirnar. Ein skuldi hugsa›, at ta› ikki ljó›ar av nøkrum, men á eini konsert kann ta› ljó›a væl og bólkast undir vi›urkenda tónlist. Tey brúka eisini samplaran og eina rútmugandadós nógv.

Men mitt í øllum larminum er ta› yndisligur poppur, tey spæla. Sarah syngur sum ein eingil, og løgini eru stundum sukursøt og bleyt sum sátubørn, tá tú sjálvur vart barn.

Ljó›i› á Vacuum er eisini gott og produseringin á høgum stø›i, gjørd av einum norskum guitaristi úr bólkinum Reflex.

Tekstirnir

Summi heiti á løgunum benda á, at ljó›ini sjálv skulu bera úttrykki› í sanginum. Til dømis Digital Lava og Sonic Ocean (ljó›hav). Tekstirnir hava líti› vi› heitini at gera, men havi› og lavastreymurin hoyrast í tónleikinum. Lag 9 eitur Autumn. Hetta er eitt lag, har allur tónleikurin liggur undir einum tungum lagi av brummandi guitarljó›i. Teksturin er um ta› at finna sær okkurt til verju, tá ljósi› og tr‡sti› hótta okkum. Fyrst er ta› sólarljós, og sí›ani er ta› scenuljós (cellophane er plastikkfilmur at brei›a yvir mat):

Starlight
sun is so bright
cellophane, cover me
stage fright
green light
Holy Spirit, cover me

Helst hevur sangurin navn eftir dáminum, og ikki tekstinum. Men ta› ber bara til at gita.

Røddin er ikki bara mi›il fyri tekstirnar, men eitt avgerandi ljó›føri. Tó eiga tekstirnir eisini sítt pláss. Har er ofta ein you, sum ikki beinlei›is ver›ur identifisera›ur. Vi›hvørt er ta› kærleiki ella longsul til hendan you, og ta› ber til at síggja ta› sum andaligan sang til Gud, og ta› ber til at lesa ta› sum kærleika til eitt menniskja. Annars er ta› eisini fyri ein part lovsangur, sum hevur ta styrki, at myndamáli› er gott, og máli› er poetiskt.

Føroyafer›in í fjør

Glorybox vóru í Føroyum fyri tíggju mána›um sí›an. Fyrsta kvøldi› tey komu, ste›ga›u tey hjá ommu og abba Jan í Kollafir›i og fóru so til Gøtu at spæla fyrstu konsertina. Hetta kvøldi› var ikki serliga væl fyriskipa›, men spældi væl av. Uttan at koma nærri inn á ta›, so vóru fólk skelka›, tí konsertin var so gó›, og fá høvdu hoyrt naka› um tey á›renn.

Tá li›ugt var, fór fólki› til hús. Glorybox hildu til í Nor›agøtu, í einum húsum fyri seg sjálv. Frítí›ina n‡ttu tey til at vitja familju hjá Jan, fiska sei› og rey›fisk og vitja fólk og stø›. Umframt losjuna spældu tey í Atlantis Bio, Café Natúr, høllini í Runavík og Nor›urlandahúsinum.

Túrurin í Klaksvík var serliga gó›ur, skiltist. Konsertin var gó›, og útselt var (sangarinnan sigur sjálv, at ta› er konsertin, henni hevur dámt best). Svøvnurin var ikki nógvur, men tey fingu gott innivist og vór›u víst runt í Nor›uroyggjum av fittum fólki. Teimum dámdi eisini at ver›a stima› yvirumaftur í ikki so stórum báti.

Samrø›a vi› Jan-Erik um leyst og fast

Tit eru á konsertfer›. Hvar?

– Vit byrja›u í Hollandi 29. januar og fara at fer›ast kring um í Benelux. Vit hava stórar ætlanir fyri summari›. Faktiskt ætla vit at taka allan heimin (ha, ha), og vit ynskja ógvuliga fegin at koma aftur til Føroya. Føroyatúrurin (mei '99) var ein av teimum betru higartil. Jan er jú føroyingur, so sum bólkur er ta› natú rligt, at vit kenna okkum heima í Føroyum.

Tit góvu eina plátu út herfyri. Eru tit væl nøgd vi› ljó› og hvørt av sínum?

– Vit eru ógvuliga errin av ljó›inum. Vit høvdu ein av teimum bestu tøkningunum í Danmark, Morten Bue, at gera okkum ljó›i› fullkomi›. Haraftrat var studii› sera gott. Ta› er kent sum ta› rúmi› í Danmark, sum egnar seg best til at upptaka trummuljó› í. Teir hava ein gamlan analogan mixara, sum Gasolin brúktu í 70'unum. Analogt ljó› rokkar!

Svarar fløgan til ta›, sum tit høvdu í huga, á›renn tit fóru í studio?

– Ja. Vit ætla›u at gera eina plátu, sum kundi spælast live, so at skilja, at vit ynsktu fegin at fáa fatur á tí orkuni, sum vit leggja í tónleikin, tá vit eru á palli. Sjálvandi eksperimentera›u vit eitt sindur í studio, og ta› haldi eg eisini rigga›i væl.

– Ta› er ótrúliga nógv í einum sangi sum Sunshower. Vit eksperimentera›u okkum fram til ljó›ini í honum saman vi› Emil (produsaranum) og Morten.

Tú tosar um live. Konsertirnar hjá tykkum eru intensar. Krevst nógv at fáa orku og stemning yvir á fløgu?

– Nei, ta› haldi eg ikki. Vit hava altí› veri› ein live-bólkur, eisini á›renn vit lærdu at spæla. Eg haldi, at ta› er partur av styrkini. Vit kunnu ikki spæla, uttan tá vit geva tí alt. Í studio ... eg haldi, at vit spældu, sum vit eru von. Ein munur er, at glasveggir eru millum okkum, og ta› ger, at ta› ber ikki til at bóltast hvørt um anna›. So instrumentini sluppu heilskala› gjøgnum upptøkurnar. Ta› stendur til tann, sum hoyrir, at døma um, hvørt ta› eydna›ist okkum, men sjálvur haldi eg úrsliti› vera gott.

Tónleikurin er sermerktur, og hann ljó›ar av djúpt kreativum arbei›i. Er hann ein blandingur av tykkum øllum, ella hvussu?

– Tónleikurin er onkursvegna ein syntesa, sum ver›ur til, tá vit venja. Men alt byrjar vi› hugskotum, sum hvør einstakur kemur vi›. Í fyrstani skriva›i Jan alt, men Sarah og eg eru farin at blanda okkum meira uppí. Jan dugir væl at skriva sangir, men ta› er stuttligt at síggja, hvussu líka vit hugsa musikalskt. Og tó so ymiskt. Sangirnir á plátuni eru fyri ta› mesta skriva›ir í felag. Samanlagt er úrsliti› Glorybox, og ta› haldi eg er eitt vakurt ting.

Er nú naka› eftir?

– Vit hava nógva orku, og fleiri gó›ir sangir eru á veg. Jan og Sarah eru gift nú, og ta› hevur eisini givi› sangskrivingini nógv gott ... aftrat so nógvum ø›rum. Ta› er eisini meir fri›ur komin yvir ta›, sum vit úttrykkja, solei›is at skilja, at vit eru vor›in meira samd um, hvat ljó›ar væl.

Hava stø›i› og gó›skan í tónleikinum naka› vi› trúnna at gera?

– Jesus gevur íblásturin. Hann er skaparin og hevur givi› menniskjunum evnini at skapa og vali› at gera ta› ella lata ta› liggja. Vit royna ikki at tala fyri eini kristnari mentan. Vit koma øll úr eini kristnari mentan, men hava sæ›, at hon er ein mentan millum a›rar. Ta› er Jesus, sum er so einastandandi. Ta› er hann, sum skal ærast.

Ein journalistur nevndi, at tekstirnir eru bæ›i djúpt romantiskir og andaligir. Ta› er tí, at hasi bæ›i hoyra saman. Jesus er ímyndin av tí romantiska, og ta› er ta›, sum vit eru hugtikin av. Let's fall in love again.

Hvussu gongur vi› konsertum, sølu og at fáa tónleikin spældan í útvarpi?

– Ja, nú er plátan komin út í Benelux-londunum (á hollendska plátufelagnum Sally Forth Records), og ta› gongur fínasta slag higartil. Nógv fólk hevur veri› á konsert, og teimum dámar væl tónleikin. Sølan gongur eisini væl, tá hugsa› ver›ur um, at vit eru enn einasta›ni langt ni›ri í undirgrundini. Men pressan í Hollandi hevur fingi› eyga› á okkum, og vit eru at hoyra í útvarpi. So ta› er gott. Teir í plátufelagnum eru nakrir verri idealistar, og teir geva seg púrasta, so vit passa væl saman.

Gamli trummusláarin, Joel, er farin burturúr. Tók hann naka› vi› sær, tá hann fór, og hevur tann n‡ggi givi› tykkum naka› n‡tt?

– Joel er ein sera gó›ur trummusláari ta› skal eingin ivast í og ta› var feitt at spæla saman vi› honum. Men hann hev›i lyndi til at yvirspæla í mun til tónleikin, vit spæla. Rútmiskt tala›, so er ta› drive, eksplosiv orka og einfeldi, sum tendrar okkum. Eg haldi, at ta› er eitt meira samt Glorybox, sum nú er á palli.

Koma tit aftur til Føroya?

– Ta› tíma vit væl, men ta› stendur til føroyingarnar. Vit vilja í øllum førum sera fegin.

Sært tú ta› føroyska aftur í Jan, nú tú hevur veri› her?

– Ja, eg kenni væl Føroyar aftur í Jan. Serliga tí vit koma frá tveimum ymiskum ekstremum. Heima lærdi eg at koma fimm minuttir fyri tí›ina, og Jan kemur frá eini mentan, har man kemur ... hmmm, seinni. Men aftaná at hava veri› í Føroyum, dugi eg at síggja, at hann ikki er tann ringasti.

Heldur tú, at ta› føroyska hoyrist aftur í tónleikinum? Okkurt vi› náttúru, oyggjalívi, ve›ri, dølskni ella kanska lad-gå anda?

– Eg haldi, at ta› man ávirka tónleikin eins og alt hitt, sum vit hava í vi›førinum. Vit koma ymsasta›ni frá, og ta› er alt ein partur av gávuni. Tá tú hyggur út yvir eitt føroyskt landslag, tvingar ta› okkurt fram í tær, tí ta› er so yvirdrivi›, so stórt og ódligt. ... Jú, ta› kann brúkast í tónleikinum.

Hvar er n‡ggi trummusláarin frá?

– Danmark. Su›urjútlandi.

Eru tit ein altjó›a bólkur? Tú og Jan tosa tr‡ mál flótandi og búgva ikki har, sum tit eru frá.

– Ja. Vit halda til saman vi› fólki av ymsum tjó›um, og okkum dámar at fer›ast. Men júst tá tú fer›ast nógv, fær tjó›arsam leikin t‡dning. Ta› er jú ein partur av okkum.

Fært tú stundir til anna› enn tónleik? Lesur tú nógv? Saknar tú mammu tína?

– Eg royni ... tónleikurin fer vi› nógvari tí›. Men eg havi sæ›, at ta› er anna› til í heiminum enn tónleikur. Eg lesi ikki so nógv, tá vit eru á tourné ... jú, tá vit fer›ast langt ... eg lesi heima. Sjálvandi sakni eg familjuna, men gentuna sakni eg mest. Ikki siga ta› vi› mammu.

Hav ta› gott. Túsund takk fyri.

Det var så lidt. Guds fred. Håber vi snart ses.

Annars merkir glorybox d‡rdarskrín.